T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

Arkitektar/byggifrøðingar
til planlegging og málsviðgerð

Á byggi- og býarskipanardeild Tórshavnar kommunu er eitt starv sum arkitektur/planleggari og eitt starv sum málsviðgeri leyst at søkja.

Høvuðsuppgávur
Arkitektur/planlegging:
- útstykkingarætlanir
- lokalplanir
- landslagsplanlegging
- býarplanlegging

Málsviðgeri:
- byggimálsviðgerð
- byggieftirlit
- samskifti við borgarar, feløg og stovnar

Førleikakrøv
Umsøkjararnir skulu verða útbúnir arkitektar, byggifrøðingar ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

Skulu duga væl føroyskt í skrift og talu og hava hollan kunnleika til telduforritini MS Office, AutoCad/Microstation GeoOutlook.

Persónligar eginleikar
Umráðandi er, at umsøkjararnir duga væl at leggja arbeiðið til rættis, eru fyrikomandi, kunna arbeiða sjálvstøðugt og eru til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði á deildini enn omanfyri nevnt.

Setanarviðurskifti
Størvini verða sett 15. januar 2001 ella skjótast til ber eftir hetta. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Kommunan bjóðar
tvey áhugaverd størv, ið eru fakliga og persónliga mennandi við góðum arbeiðsumstøðum í nýggjum hølum.

Meira fæst at vita
um størvini við at venda sær til Ova Mortensen, býararkitekt, ella Marius Müller, tekniska stjóra, tlf. 31 51 60.

Umsóknir
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. januar 2001. Viðmerk á umsóknina "starv á byggi- og býarskipanardeildini".

Byggi- og býarskipanardeildin er deild undir teknisku fyrisitingini, ið eitt nú umsitur ognir kommununnar, frílendi, byggieftirlit, útstykkingar, planlegging, prosjekt o.a. Á deildini starvast 8 fólk, umframt húsvørðatænastan og frílendisdeildin við 22 fólkum.

S N A R S K I V A N

Lýsið í sosialinum

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

Verkfrøðingur/byggifrøðingur
til prosjekt/planlegging og málsviðgerð

Á teknisku deild Tórshavnar kommunu er eitt starv sum prosjekt/planlegging og eitt starv sum málsviðgeri leyst at søkja.

Høvuðsuppgávur
Prosjekt/planlegging:
- planlegging og prosjektering av uppgávum, ið deildin umsitir
- eftirlit og samskifti við privat ráðgevandi virki
- luttaka í øðrum uppgávum á deildini

Málsviðgeri:
- málsviðgerð og fyrireika mál til nevndarviðgerð
- samskifta við borgarar, stovnar, virki og onnur
- luttaka í øðrum uppgávum á deildini

Førleikakrøv
Umsøkjararnir skulu verða útbúnir verkfrøðingar, byggifrøðingar ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

Skulu duga væl føroyskt í skrift og talu og hava hollan kunnleika til telduforritini MS Office, Microstation GeoOutlook/AutoCad.

Persónligar eginleikar
Umráðandi er, at umsøkjararnir duga væl at leggja arbeiðið til rættis, eru fyrikomandi, kunna arbeiða sjálvstøðugt og eru til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði á deildini enn omanfyri nevnt.

Setanarviðurskifti
Størvini verða sett 15. januar 2001 ella skjótast til ber eftir hetta. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita
um størvini við at venda sær til Boða Haraldson, býarverkfrøðing, ella Marius Müller, tekniska stjóra, tlf. 31 51 60.

Umsóknir
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. januar 2001. Viðmerk á umsóknina "starv á teknisku deild".

Tekniska deild er deild undir teknisku fyrisitingini ið eitt nú umsitur vegir og gøtur, veitingar, heilsu- og umhvørvismál, ferðsluviðurskifti, bussleið o.a. Á teknisku deild starvast 7 fólk, umframt vatn- og gøtuljós, vegdeildin og reinhaldið við uml. 54 fólkum.

S N A R S K I V A N

Vit ynskja viðskiftafólki okkara eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár við tøkk fyri brátt farna árið.

J.M. Motorar í Miðvági

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Deildarleiðari

Við hesum verður eitt starv sum deildarleiðari í kommunala eftirlitinum á Løgmansskrivstovuni lýst leyst at søkja.

Uppgávur
Uppgávurnar hjá deildarleiðaranum í kommunumálum eru at sita fyri kommunala, herundir fíggjarliga, eftirlitinum við kommununum, at stýra broytingum í uppgávu- og ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur og at samskipa hesar broytingar.

Faklig førleikakrøv
Tann, ið settur verður, skal hava samfelagsvísindaliga kandidatútbúgving frá lærdum háskúla t.d. cand.jur., cand.polit. ella líknandi útbúgving.

Persónlig førleikakrøv og royndir
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Leiðsluroyndir eru ein fyrimunur.

Løn og setanartreytir
Løn og setanartreytir sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya.

Setanarøki
Setanarøkið er Løgmansskrivstovan við tilhoyrandi stovnum og aðalstýrini.

Vit kunnu bjóða
Talan er um eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og góðum møguleikum fyri eftirútbúgving.

Nærri upplýsingar um starvið
Fyrispurningar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Rúna Joensen, deildarstjóra, tlf. nr. 351010.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

Løgmansskrivstovuni
Postsmogu 64
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi 11. januar 2001 kl. 12.00.

Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í tríggjar deildir og tvær tænastueindir og hevur í høvuðsheitum tvørvegis og samskipandi uppgávur, eitt nú landsstýrisfundir, uttanlandsmál, umboðan, starvsfólkapolitikk, fyrisiting, nýskipan, kommunumal og sjálvstýrismál.

Landsfelag Pensionistanna

ynskir øllum pensionistum eini gleðilig jól og eitt av Harranum eydnuberandi og signað nýggjár.

Heilsan
Landsfelagið

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

HONDA CIVIC 1,4
Sera væl útgjørdur bilur, Honda Civic 1,4 S frá sept. 95, sera væl hildin. Hevur nógva eykaútgerð: El-sóltak, el-spegl, el-rútar framman, 2x airbags, pover-steering, central lás og JVC Stereo. Bilurin hevur eisini: Alu-felgur V/ summardekkun og aðrar felgur við píkadekkun. Er rustviðgjørdur í novembur 2000, og sýndur í dec. 2000. Ring og hoyr nærri.
Terje Vestergaard
Tlf. 447013

YNSKIST
Diesel motorur til Toyota Corolla, árg. 86, ynskist til keyps.
Tlf. 250750

OPEL ASCONA 1,6
Árg. 87, við skaða, verður seldur heilt bíliga. Kom og síggj. Nógvir eykalutir fylgja við.
Tlf. 375055

PÍKADEKK
Fýra lítið brúkt Pirelli píkadekk, 145x13, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 316007

DAIHATSU ROCKY 4x4
Turbo diesel, mekaniskt í góðum standi, árg. 86, til sølu. Prísuppskot 12.000 kr.
Tlf. 444785

CALIBRA
Svartur Opel Calibra til sølu.
Tlf. 211415

NISSAN BLUEBIRD
2000 motor og 15" sportsfelgur, sýnaður í ár, til sølu.
Tlf. 251721

TIL SØLU
Fýra felgur v/ heilársdekkum, 155/70-13, lítið brúkt, 1.500 kr. Kølari til Ford Fiesta, 500 kr.
Tlf. 315885

4 FELGUR TIL KIA
til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 289741

EYKALUTIR
Eykalutir til Ford Sierra 1,6 frá 1986 sera bíliga til sølu. Nýggjur forrútur, útstoyt, setur, hurðar, motorhjálmur osfr.
Tlf. 313133

FORD ESCORT
diesel til sølu.
Tlf. 218540

PÍKADEKK
COLWAY 165/70 x 13, 4 stk. Og píkadekk við felgum til Toyota Corolla, 4 stk. 155 /80 x 13.
Tlf. 451044
ella 451014

OPEL ASCONA
1985, sýnaður 19.10.2000. Ein Opel Ascona 1986 uttan plátur, og ein Mazda 323 uttan plátur til sølu.
Tlf. 315227
ella 0045 26 53 04 91

TIL SØLU
Pentium 2 300 MHz, 128 MB ram, 10 GB harddisk, Conner tape backup, 56k modem, 15" Ei20 skíggja, 36 x CD rom, telduborð, spøl og programm. Kostnaður 5.800 kr.
Tlf. 319868

DAIHATSU CHARMANT
Árg. 87, sýnaður í sept. 2000, koyrt uml. 60.000 km, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 221911

PÍKADEKK TIL SØLU
Fýra Firestone Snow Grip píkadekk til sølu fyri 1.500 kr. Stødd 175/70-13". Dekkini eru 1 ára gomul og lítið brúkt.
Tlf. 220744

HEILÁRSDEKK
Fýra Bridgestone heilársdekk til sølu fyri 1.700 kr. Dekkini eru ongantíð brúkt og støddin er 165/75-14".
Tlf. 220744

SUBARU 1.6 STW.
Árg. 87, bíliga til sølu. Krevur ábøtur.
Tlf. 44 32 57
ella 22 07 07

FÝRA 13" FELGUR
bíliga til sølu. Til m.a. Toyota Corolla.
Tlf. 315554

TOYOTA CARINA II
árg. 88, til sølu. Sýnaður í nov. 2000. Hevur nýggj píkadekk.
Tlf. 220523

TIL SØLU
Fýra góð píkadekk v/ felgum til Ford Focus til sølu.
Tlf. 218540

FORD COURIER
diesel til sølu.
Tlf. 218540

FORD ESCORT 1.3
Nýsýnaður reyður Ford Escort 1.3 CL arg. 89 ,175.000 km. Koyrt uml. 10 ár í Danmark. Til sølu fyri 15.000 kr ella hægstbjóðandi.
Tel 315491 eftir kl. 18.00

Amboð

TIL SØLU
180 amp. sveisiapparat til elektrodu- & tig-sveising.
Tlf. 210181

LIFT- DÆKMASKINA...
afbalanseringsmaskina, Co2 sveisiapparat, luftkompressari o.a.
Tlf. 311441

Arbeiði

ARBEIÐ YNSKIST
Genta, 15 ár, og drongur, 14 ár, ynskja arbeiði nakrar tímar um vikuna.
Tlf. 313133

TILBOÐ YNSKIST
uppá at grava og brekka ella spreingja fyri dreni.
Tlf. 313133

ALT FYRIFALLANDI
arbeiði verður gjørt av tilkomnum handverkara.
Tlf. 310352

Barnaútgerð

TIL SØLU
Vælhildin, myrkabláur Brio barnavognur v/ lift, fluguneti og dýnu, bert brúkt til eitt barn, til sølu fyri 2.800 kr.
Tlf. 312056

BABY LURTITÓL
Lítið brúkt baby lurtitól til sølu fyri 400 kr. Tveir uppladarar og uppladilig battari fylgja við.
Tlf. 281212 ella 220744

PUSLITASKA
Vøkur, myrkablá Simo puslitaska til sølu. Óbrúkt. Nýprísur 500 kr. Prísuppskot 300 kr.
Tlf. 281212 ella 220744

Bátaútgerð

TIL SØLU
Heilautomatiskar vágasnellur til sølu f yri 2.000 kr. stk.
Tlf. 289741

7-MANNAFAR
Eitt føroyskt, frambygt 7-mannafar við 10 HK Sabb motori til sølu.
Tlf. 310286, e. kl. 18

Burturm. /funnið

FUNNIÐ
Giftiringur funnin í FK í Hoyvík leygardagin 16. des. Eigarin biðist venda sær til skrivstovuna, tlf. 314149.

FUNNIÐ
Oyrasnigil funnin í FK í Hoyvík. Eigarin biðist venda sær til skrivstovuna, tlf. 314149.

FUNNIÐ
Í Keppssamtøkuni í Hoyvík er ein kvittan fyri eina Jamaica hurð (bók) úr Skemmuni funnin. Um eigarin vil hava hana, vend tær til skrivstovuna, tlf. 314194.

BURTURMIST Í TB-HÚSINUM
Tann, sum av misgáum hevur tikið ein svartan leðurjakka við einari fartelefon í lummanum leygarkvøldið tann 16. des., verður biðin at ringja á Tlf. 373070

BURTURMIST
Hevur nakar av misgáum tikið mín svarta Helly Hansen-jakka í Casablanca fríggjakvøldið 15. des., so vinarliga ring Tlf. 218015

FUNNIÐ
3 systemlyklar funnir í »Hon & Hann« í Gongugøtuni.
Ring tlf. 316515 Hon & Hann

SVØRT MAPPA
við fløgum í, funnin við rundkoyringina á Hálsi. Á umslagnum er merkið »Ford« og fleiri av fløgunum eru merktar »Annika«.
Ring Tlf. 318488

BURTURMIST
Hevur nakar funnið mína fartelefon, so vinarliga ring 316139. Finninganlarlon verður latin.
Tlf. 316139, Høgni

Býli

HÚS Í HAVN TIL LEIGU
Hús miðskeiðis í Havn við øllum innbúgvi og hentleikum til leigu í upp til 6 mánaðar í senn. Leigumál í longri tíðarskeið hava ongan áhuga. Leigumálið kann td. byrja í januar og í august. Stova, køkur, 4 soviverilsi, 1 baðiverilsi, 2 wc, vaskirúm og kjallari. Kr. 7.500 u/ ljósi og hita. 1 mðr. depositum.
Tlf +45 70 22 72 07

KAMAR YNSKIST
Kamar ynskist til leigu í Havn. Alt hevur áhugað. Vinarliga ring: 332780 ella
E-mail:semic@post.olivant.fo

HÚS YNSKIST TIL LEIGU
Einlig mamma v/ trimum fittum børn ynskir hús til leigu í Norðstreymoy ella í Eysuroy frá 1. jan. fyri max. 3.000 kr. um mðr. uttan el og olju. Eru friðarlig og fara væl um.
Tlf. 221367

ÍBÚÐ ELLA HÚS SØKIST
Hjún við 5 børnum søkja eftir íbúð ella húsi til leigu í Tórshavn ella nærhendis.
Tlf. 0045-75470394

HÚS Í HAVN TIL LEIGU
Hús miðskeiðis í Havn við øllum hentleikum til leigu í upp til 6 mðr. í senn. Leigumál í longri tíðarskeið hava ongan áhuga. Leigumálið kann t.d. byrja í januar og í august. Stova, køkur, 4 soviverilsir, 1 baðiverilsi, 2 wc, vaskirúm og kjallari. Kr. 7.500 u/ ljós og hita. 1 mðr. depositum.
Tlf. +4570227207

Dýr

AKVARIUMSFISKAR
Akvarie fisk sælges billigt. Bl.a. perlegurami, Prinsessen af Burundi (Cichlide) og Metalpansermaller.
Tlf. 219194 / 319194

HVØLPUR
Vakur, 3 1/4 mðr. gamal labrador hundahvølpur til sølu.
Tlf. 281244, e. kl. 18

KETTLINGUR
Grástriputur kettlingur (frensur) fæst við at ringja
Tlf. 421661

TIL SØLU
Eitt akvarium 60 litrar vi? tilhoyri og fiskum til solu fyri kr. 900.
Tlf. 316022

TIL SØLU
Zebrafinkur og undulatar til sølu.
Tlf. 314434

Innbúgv

SOVISOFA
Furu sovisofa, 140x200, til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 313454

SONG /MØBLAR
Myrk dupultsong 150x200 uttan madrassir og botnar v/ náttborðum, kommodu og spegli, til sølu fyri 1.600 kr. Gongsmøbil og spegl við ljósi í, ljóst træ, til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 448056

SJÓNVARPSBORÐ
Ljóst træfarvað, við einari skuffu, videohill og fýra smáum rúmum til sølu fyri bert 150 kr.
Tlf. 281212 ella 220744

SONG TIL SØLU
Fitt furusong, 120x200, við madrassu og rullimadrassu til sølu fyri bert 1.200 kr.
Tlf. 281212 ella 220744

KØKSBORÐPLÁTA
Myrk køksborðpláta (272 cm long) við niðurfeldum vaski til sølu fyri 2000,- kr.
Tel 315491 eftir kl. 18.00

TIL SØLU
Myrk dupultsong við náttborðum og lampettum bíliga til sølu.
Tlf. 312040

GÓÐAR ETAGUSENGUR
v/ madrassum og skuffu til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 315554

Lutaseðlar

10. FL. Í TOFTA SKÚLA
Hesir vinningar eru ikki avheintaðir: 1) 3132 2) 1409 4) 2540 9) 1303 10) 3829 12) 4305 13) 4058 Ringið á tlf. 447171 innan 15. jan.

GIROKORT HJÁ JAVNA
Lutaseðlarnir á girokortinum vórðu drignir 12. des. 2000: 1) Ferðin til London nr. 54510 2) Gávukort frá Idéhúsinum nr. 166069 3) Gávukort frá Føroya Keypssamtøku nr. 118919 Øllum, ið keyptu seðlar, takka vit hjartaliga fyri stuðulin.
Javni

HAVNAR BÓLTFELAG
15. des. vórðu fylgjandi nummar hava drigin:
1) 621 2) 2306 3) 6334 4) 9301

FRÁ VÍF
Drátturin av lutaseðlunum hjá VÍF tann 16. des. gav hetta úrslit:
Oksafjórðingur nr. 31642 Bláur seðil Karamellueskja nr. 19888 Hvítur seðil Fleskasteik nr. 31842 Bláur seðil Tey, sum hava vunnið, verða biðin um at venda sær til Jógvan Sigurd á tlf. 424179.
Goymið seðlarnar, tí um eingin vinnari er funnin, verður drigið av nýggjum tann 27. des. 2000.
VÍF

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Bræaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12^{00}, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki